Financial Times

Saklig viðgerð av føroyskum viðurskiftum



FINANCIAL TIMES SURVEY

The Faroes in the North Atlantic enjoy home rule under the Kingdom of Denmark. The islands are experiencing a booming economy, despite the problems in the fishing industry, as **Hilary Barnes** reports.

High standard of living

The Faroe Islands

Financial Times Tuesday October 27 1987

Government and constitution

A complex political pattern

FAROES' INCOME

Bretska stórblaðið Fiancial Times gav út í seinastu viku (27. okt.) eykablað um Føroyar undir heitinum »Financial Times Survey«. Ein talskvinna fyri blaðið, Ruth Pincombe, kom henda vegin í august til at fyrireika útgávuna og segði tá fyri Sosialinum, at tann stóra umtalan, Føroyar fingu í Bretlandi aftaná BBC-sendingarnar um føroysku hvalaveiðuna vóru eftir blaðstjórnarinnar tykki ójavnvigað og eintáttað, og blaðið vildi tískil viðgera føroysk viðurskifti á sakligan hátt og greiða lesarunum eitt sindur frá landinum, politikkinum, sjóvinnuni og øðrum týdningarmiklum málum.

Tiðindamaðurin Hilary Barnes, sum býr í Danmørk, hevur skrivað allar greinirnar og úrslitð er ein javnvigað og nágreinilig frágreiðing, ið nemur við næstan alt av týdningi í føroyska samfelagnum: teir stóru og fløktu politisku mótsetningarnar, høgi livifóturin, svartkjaftaævintýrið, tøkniframburin, spurningurin um undirgrundina, húsagangurin, útflutningurin, og sjálvandi hvalaveiðan.

Av frágreiðingini at døma hevur blaðmaðurin verið so heppin at komið fram á Óla Breckmann í flogfarinum á veg til Føroya. Óli sigur við blaðmannin, at »livið hjá føroyingum hevur altið verið ein javnvágisgongd millum tað ótrúliga og tað ómøguliga«. Eftir at hava so beinrakið lýst føroyska veruleikan, kemur ideologiska øðin í Óla og hann greiðir blaðmannunum frá geopolitiska veðurlagnum í Føroyum. Næstan allir føroyingar eru »fanatiskir« viðhaldsmenn hjá Vesturheimunum, og stórur meiriluti stuðlar NATO. Meirilutin vil eisini at NATO radarstøðirnar verða verandi á klettunum. Tað er ein sterk almenn áskoðan, at russarar skulu haldast langt burtur.

Aðrir føroyingar, blaðmaðurin hjá Financial Times tosar við, virka ikki serliga ideologiskt fjálturstungnir, og teir geva sakliga og greiða lýsing av teimum fjølbroyttu politisku og búskaparligu umstøðunum, harímillum Birgir Danielsen og Jóhan Mortensen, stjóri, Atli Dam, Árni Olafsson, Liggjas í Bø, Bjarni Joensen í Miðvági, Kjartan Hoydal og aðrir. Hópurin av hagtølum er í blaðnum, soleiðis at lesarin fær eina skilagóða og greiða mynd av viðurskiftunum. »Yvirlitið« hjá Financial Times kann tískil brúkast sum eitt hent leksikon um tey politisku og búskaparligu viðurskiftini í Føroyum.

Viðvíkjandi svartkjaftinum sigur blaðmaðurin, at føroyingar hava ta áskoðan, at verður svartkjaftur til matna viðurkendur millum brúkarar í V-Europa, so er leiðin opin til óavmarkað ríkidømi í Føroyum. Og megnar svartkjafturin ikki at bjarga føroyska fiskiðnaðinum, so er fiskaalingin tann stóra vónin.

Hvalaveiðan fær bert stutta viðgerð í yvirlitinum hjá Financial Times. Atli Dam lýsir har føroysku sjónarmiðini nakað á sama hátt og hann gjørdi í føroyska filminum »Whale Wars« herfyri. »Vit halda fram ...«, sigur Atli. »Eg vildi ikki følt meg sum føroying, fekk eg ikki grind og spik einaferð um vikuna«. Blaðmaðurin greiðir eitt sindur frá mótmælistiltøkum móti hvalaveiðuni og hvussu hesi mótmælini hava ávirkað føroysku hvalaveiðuna. Hann greiðir frá, hvussu føroyingar hava svarað uppá hesi mótmælini. Hann endurgevur Edmund Joensen, stjóra, ið sigur beint fram, at »hetta er veruliga ein spurningur um, um vit skulu yvirhøvur eta djór«.

Atli Dam vísir á, at teir, sum mótmæla hvalaveiðuni, liva í stórbýunum og kunnu ikki siggja sambandið ímillum kjøtið, teir eta, og ta sannroynd, at fyri at fáa hetta kjøtið, mugu djór slaktast.

Dorthea Bloch, ið verður lýst sum fremsti føroyski autoriteturin í hvalaveiðu-spurninginum, vísir á, at umleið 150.000 grindahvalir verða veiddir kring heimin hvørt ár, mest av fiskimonnum, ið veiða tunfisk, og hetta ger alt rokið yvir teimum 1700 hvalum, vit veiða árliga, fullkomiliga villleiðandi.

Blaðmaðurin sigur eisini, at føroyingar eru so óðir vegna reaktiónirnar kring heimin til eina siðbundna veiðu, at útlendsk blaðfólk, ið vilja sleppa at siggja drápið, ikki eru vælkomin. »Vit hava trupulleikar við at verja teir fyri lokalu fólkunum«, sigur Atli Dam.

Eykablaðið um Føroyar endar við nágreiniligum upplýsingum um, hvørjar møguleikar fólk hava at ferðast til Føroya. Nógvar føroyskar fyritøkur, og harumframt Landsstýrið, lýsa í hesum eykablaðnum, m.a. Ferðamannastovan, Frimerkjadeildin, Wenzel Petersen, Fiskasølan og Føroya Banki.

Financial Times verður mestt sum eitt tað mest álitandi og sakliga dagblað, ið verður givið út í heiminum. Tað hevur umleið 250.000 haldarar kring allan heimin og verður nógv lisið av handilsfólkum og øðrum, ið virka innanfyri altjóðahandil og altjóðabúskap.

etj.



Financial Times Tuesday October 27 1987

FAROE ISLANDS 2

Fishing industry developments

The blue whiting gamble

Main exports

Strong views on whaling

High-tech talent

Big hopes for fish farming